## Koyrandi um Dalánna

Brúgvin um Dalánna, sum tryggjar fólki á Signabø og Oyrareingjum vegasamband, er nú tikin í nýtslu. Onkrir snøklar eru eftir at gera, men verður hetta ikki gjørt fyrrenn komandi vár ella summar, upplýsir Landsverk. Talan er millum annað um at gera ein gonguteig lidnar og at hampa økið rundanum. Brúgvin er 27 metrar til longdar.



## Dráp var neyðverja

Tað var lóglig neyðverja, tá ein 23-ára gamal maður í mai við einari byrsu skjeyt ein 42-ára gamlan mann í Glejberg í Danmark. Tað avgjørdu nevningarnir í Vestre Landsret í Esbjerg í gjár eftir at hava votera í longri tíð. Heilt fram til endan var spenningurin stórur, tí tann 23-ára gamli og 25-ára gamli vinmaður hansara høvdu havt byrsuna og tríggjar patrónir við, tá teir fóru at vitja ein kvinnuligan starvsfelaga. Hendan livdi í fimm ár saman við tí 42-ára gamla, og í svartsjúku legði hann á teir báðar, so hin 23-ára gamli skjeyt og drap mannin. Teir báðir verða tó revsaðir fyri ikki at hava hildið vápnalógina

# Bæði lumpaður og revsaður

**Ein maður verður nú settur í geglið, tí hann vildi hava bíligt hassj, men umframt at verða revsaður, varð hann eisini lumpaður**

SMUGGLING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

At fólk, sum selja hassj og narkotika, er púra óálítandi, mátti ein maður sanna í Føroya Rætti í gjár.

Hann hevði roykt hassj at kalla dagliga, men helt, at tað var ov nógv at betala 200 krónur fyri grammið, sum er prísurin í Føroyum.

Tí hevði hann bílagt sær 160 gramm úr Danmark fyri ein brotpart av tí prísinum.

Men tá ið hann fór á posthúsið eftir pakkanum, vóru bara 95 gramm í.

Hann hevði betalt einum seljara 5.000 krónur fyri ómakin, men hann vildi ikki siga, hvørjum hann hevði keypt frá, ella, hvør hevði fingið pengarnar.

Hinvegin hevði løgreglan fingið snevilin av, hvat fór fram og sostatt varð maðurin handtikin og drigin fyri rættinum.

Umframt at hann hevði fingið 95 gramm, fann løgreglan útav, at hann hevði roynt at smuggla 160-200 gramm av hassji úr Danmark.

Og í rættinum viðgekk maðurin seg sekan í at hava roynt at smuggla 160 gramm av hassji, hóast hann bara hevði fingið 95 gramm.

Hann varð eisini spurdur um, hví hann hevði roynt at smuggla.




*Tey, sum selja hassj og narkotika eru ikki altíð líka álítandi. Tað mátti ein maður ásanna í Føroya Rætti í gjár. Hann royndi seg sum smugglara, men tað kostaði honum 40 dagar handan rimarnar*

Og tann frágreiðingin varð líka logisk, sum hon var greið, tí maðurin dugdi ikki at síggja endamálið í at keypa hassj í Føroyum fyri 200 krónur fyri grammið, tá ið hann kundi fáa tað í Danmark fyri ein brotpart av tí.

Men umframt at verða lumpaður av seljaranum, noyðist hann nú eisini í geglið.

Revsingin fyri at smuggla rúsevnið til Føroyar liggur í nokk so føstum karmum. Fyri at smuggla minni enn 100 gramm av hasji, er dómurin 20 dagar handan rimarnar.

Hesin maðurin varð dømdur at sita í 40 dagar, tí hóast hann bara fekk fatur á 95 grammum, hevði hann roynt at smuggla 160 gramm og tað taldi alt samalt við, tá ið revsingin varð ásett.

Maðurin góðtók dómin á staðnum.

# Noyðist helst at halda jól í geglinum

**Ein maður, sum er undir illgruna fyri at hava jagstrað eina konu við øks í Havn, er fyribils fongslaður í fýra vikur**

FONGSLING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein maður, sum er skuldsettur fyri fleiri lógarbrot, noyðist helst at halda jól í geglinum.

Tað er greitt eftir, at hann var fyri í Føroya rætti í gjár.

Maðurin er skuldsettur fyri fleiri lógarbrot. Tað, sum hevur vakt mest ans millum manna, er, at hann er skuldsettur fyri at hava verið eftir eini konu í Havnar Timburhandli við øks.

Men hann er eisini skuldsettur fyri fleiri onnur innbrot í Havn og eisini okkurt uttanfyri Havnina.

Í tí eina førinum er hann skuldsettur fyri at hava brotið inn í eina dynamittgoymslu, har hann stjól 25 kilo av dynamitti, sum hann síðani goymdi uppi í Hoydølum á økinum ímillum studentaskúlan og Hvítanesvegin.

Sunnukvøldið varð maðurin varðhaldsfongslaður í tríggjar ferðir 24 tímar og tann freistin var úti í gjár.

Tí varð hann aftur fyri í rættinum í gjár og har vildi ákærin hava hann varðhaldsfongslaðan í fýra vikur ímeðan málið verður kannað.

Ein grundgeving fyri at krevja mannin varðhaldsfongslaðan, er, at verður hann leyslatin, er stórur vandi fyri, at hann fer at halda fram við ólógligum virksemi.

Fyri ikki at órógva kanningararbeiðið, vil løgreglan ikki uppplýsa so nógv í málinum.

Til at styðja sínar frágreiðingar, hevur løgreglan upptøkur frá vakmyndatóli í Havnar Timburhandli og sum tók hendingina hesa náttina upp á sjónband.

Men Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni, sigur, at maðurin noktar seg sekan í øllum skuldsetingum.

Av tí sama skeyt tann skuldsetti avgerðina um at varðhaldsfongsla hann í fýra vikur, inn fyri Landsrættin.

Sostatt stendur tað nú til landsrættin um maðurin skal halda jól í geglinum ella ikki.

# Miseydnað smuggling kostaði 12.000 krónur

**Ein maður royndi at smuggla 12 kartengur av sigarettum til Føroyar, men tað varð dýrt**

SMUGGLING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Herfyri royndi ein maður at smuggla 12 kartengur av sigarettum til Føroya.

Men tað varð honum ein dýr søga.

Hann varð tikin og í gjár fall so hamarin í Føroya Rætti.

Revsingin fyri smuggling er í føstum rammum. Fyri tað fyrsta skal allur vanligur tollur rindast, men harafturat skal tvær ferðir tann upphæddin betalast í bót.

Í hesum føri varð maðurin dømdur at betala 4.080 krónur í tolli fyri at hava smugglað 12 kartengur av sigarettum.

Men harafturat varð hann dømdur at betala tvær ferðir 4.080 krónur í bót, ella tilsamans 8.160 krónur í bót.

Sostatt kostaði tað honum tilsamans 12.240 krónur at royna at smuggla hesar 12 kartengurnar av sigarettum.

Men somuleiðis legði løgreglan hald á 1000 krónur, sum hann hevði selt níggju kartengur fyri. Og harafturat legði løgreglan hald á hinar tríggjar kartengurnar.

*Tað kann vera dýrt at royna at smuggla sigerettir til landið. Tað mátti ein maður ásanna í Føroya Rætti í gjár*

